## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi, um kvøldið upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 10 og 13 stig.




**Veðrið hósdagin og fríggjadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 8 og 11 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og regn av og á. Hitin millum 6 og 10 stig.

# Einaferð var tað ein ær

**Ofta frætta vit um bilar, sum fara út av vegnum ella fáa skaða, tí seyður loypur inn á vegin. Men hendan dagin hendi tað øvugta. Ein ær varð yvirkoyrd av einum bili, sum fór útav**

FERÐSLUVANLUKKA
*Edvard Joensen*

Eins og hinar níggju og níti á sinni lá hon so trygt, hendan høvuðsvarta ærin, innanvert Skipanes.

Hon var von við allar bilarnar, sum dagliga strúka framvið og hugsaði ikki um, at teir kunnu vera vandamiklir. Hon lá trygt niðan fyri vegin og kendi seg varda fyri hesum heimsins óljóði og skundi. Hugsaði um at fáa eitt sindur í vombina. Til sín sjálvs og tað lambið, sum væntandi skuldi koma um ein góðan mánað ella so.

Men so við eitt broyttist alt hetta við einum bulduri. Eitt av hesum ódjórunum kom sendandi oman eftir vøllinum og rakti hesa friðarligu, etandi ærina, so hon meiddist so illa, at hjartagóðir menn, sum komu framvið, vórðu noyddir at avlíva hana.

Unga kvinnan, sum hendan dagin var á veg inn móti Skálafirði, misti brádliga tamarhaldið á bilinum, og hóast fleiri royndir at rætta uppaftur, endaði tað við, at hon koyrdi útav. Sjálv fekk hon ongan skaða.

Mangan frætta vit um bilar og viðhvørt eisini fólk, sum fáa skaða av seyði, ið liggur fram við vegnum, og viðhvørt eisini á vegum.

Tað hevur í fleiri førum víst seg at hava sína orsøk í, at menn geva seyðinum í so nær vegnum. Har høgligast er. Tá so er, er einki at siga til, at hann heldur til har. Vit fara eisini har, okkurt er at vinna til búkin.



## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷12 |
| Nuuk | ÷10 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | ÷3 |
| Halifax | 0 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 4 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 11 |
| Tromsø | – |
| Bergen | 8 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 7 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | 5 |
| Moskva | 7 |
| Berlin | 11 |
| Warzawa | 7 |
| Kiev | 7 |
| Bukarest | 9 |
| Paris | 13 |
| Madrid | 6 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 14 |
| Athen | 15 |
| Malta | 14 |
| Tunis | 16 |
| Beijing | 14 |
| New Dehli | 33 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 27 |
| New York | 7 |
| Miami | 23 |
| Los Angeles | 28 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | 12 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 30 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa. við Ísland stendur mestsum í stað og grynnist. Eitt hátrýst, 1026 hPa. yvir Norðsjónum viknar.




Lágtrýstið við Írland stendur mestsum í stað og dýpist, so landsynningsvindurin heldur á nakrar dagar enn.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 29/03 kl. 06⁰⁰–30/03 kl. 06 ⁰⁰. Hitin í gjár: 7,9°
Minsti hiti máldur í mars: ÷8,7° - Mesti hiti máldur í mars: 12,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm –mált frá 29/03 kl. 06 ⁰⁰–30/03 kl. 06 ⁰⁰
Avfallið higartil í mars: 92,7 mm





www.sosialurin.fo


## VESTFALLSKYRRINDI

27. mars: Mánin longst frá jørðini
29. mars: Fyrra kvarter
5. apríl: Fullmáni
8. apríl: Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. mar | 03.54 | 16.16 | 02.54 | 15.16 | 03.09 | 15.31 | 05.54 | 18.16 | 06.54 | 19.16 |
| 1. apr | 04.41 | 17.03 | 03.41 | 16.03 | 03.56 | 16.18 | 06.41 | 19.03 | 07.41 | 20.03 |
| 2. apr | 05.25 | 17.46 | 04.25 | 16.46 | 04.40 | 17.01 | 07.25 | 19.46 | 08.25 | 20.46 |
| 3. apr | 06.07 | 18.28 | 05.07 | 17.28 | 05.22 | 17.43 | 08.07 | 20.28 | 09.07 | 21.28 |

| Dagur | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 31. mar | 02.09 | 14.31 | 01.09 | 13.31 | 04.09 | 16.31 | 05.09 | 17.31 | 03.39 | 16.01 | 04.54 | 17.16 |
| 1. apr | 02.56 | 15.18 | 01.56 | 14.18 | 04.56 | 17.18 | 05.56 | 18.18 | 04.26 | 16.48 | 05.41 | 18.03 |
| 2. apr | 03.40 | 16.01 | 02.40 | 15.01 | 05.40 | 18.01 | 06.40 | 19.01 | 05.10 | 17.31 | 06.25 | 18.46 |
| 3. apr | 04.22 | 16.43 | 03.22 | 15.43 | 06.22 | 18.43 | 07.22 | 19.43 | 05.52 | 18.13 | 07.07 | 19.28 |

5 707265 100036 >